## DAGSINS MEINING

# Stórur ivi um fíggjarlóg

Tað er ein løgin støða, ið løgtingið er komið í av fíggjarlógaruppskotinum, og atfinningarnar tróta ikki. Eftir eitt samgonguskjal, ið lovar gull og grønar skógir umframt skattalætta uppá 50 til 150 milliónir, sæst lítið og einki til hetta í fíggjarlógaruppskotinum. Í fjølmiðlunum hevur fíggjarmálaráðharrin kunngjørt, at tað kemur ikki eitt oyra upp á fíggjarlógina afturat. Skal nakað gerast, so skulu niðurskurðir finnast svarandi til tað, ið skal gerast. Her hongur ikki saman. Her kemur at svíða.

Løgmaður letur skína ígjøgnum, at nú verður farið eftir almenna sektorinum. Eftir at hava gingið á odda at byggja upp ein stóran almennan sektor við fleiri nýggjum aðalstýrum, verður nú farið undir at pilka hendan almenna sektorin sundur aftur. Tað er møguligt, at vit hava ein ov stóran almennan sektor, men eitt nútímans framkomið samfelag má hava eina vælvirkandi fyrisiting, eitt gott heilsuverk, eitt almannaverk, ið lýkur vanlig krøv til vælferðarsamfelagið og eitt gott útbúgvingarverk. Her hongur ikki saman. Øll samgongufólk vita, hvat ið er galið, men einign torir at nevna meginorsøkina til ruðuleikan: tann nógv skerda blokkin.

Undir orðaskiftinum um fíggjarlógaruppskotið nýttu samgongufólk heilt nógva tíð og orku til tess at royna at prógva, at skerdi blokkurin var til gangs fyri almenna búskapin. At blokkskerjingin einki hevði við ta trongu fíggjarlógina at gera - at skerdi blokkurin var einki minni enn búskaparliga bjargingin. Tey nýttu so nógva orku, at hetta gjørdist beinleiðis illgrunasamt. Hví gera so nógv burturúr, tá ein veit at ein hevur rætt. Er tað ikki tí, at tey innast inni vita, at tey mistaka seg? At blokkskerjingin er vorðin mestsum ein trúarspurningur fyri ávísar samgongutingmenn? Her hongur ikki saman! Øll kunnu semjast um, at blokkurin eigur at minkast. Men hetta eigur at verða gjørt so líðandi og ikki sum ein sjokkviðgerð, tí blokkurin hevur eisini gjørt mikið gagn. At hann skaðar er ikki ein skjalprógvaður búskaparligur veruleiki.

Tá Írland fyri góðum ári síðan atkvøddi nei til Nice-sáttmálan, var tað tí at Nice-skipanin og víðkanin eystureftir merkti, at blokkurin frá ES fór at verða avtikin. Írar vistu sum var, at blokkurin frá ES var meginorsøkin til búskaparligu framgongdina í Írlandi seinastu 10 árini. Hetta eru allir leiðandi búskaparfrøðingar samdir um. Nú hava írar fingið vissu fyri, at teir onga sjokkviðgerð fáa og atkvøddu tí ja fyrradagin. Men her heima er einki avklárað, her er ruðuleiki, her flýtur alt, og samgongan heldur fram við klandrinum um fíggjarlógina til stóran skaða fyri land og fólk. Hvussu leingi kann hetta óskil halda fram?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Landsliðið og fólkaheilsan



**Ísak Mikladal**
**skrivari FSF's**

Sosialurin hevði leygardagin 19. oktober 2002 eitt áhugavert hugskot í sambandi við føroyska landsliðið í fótbólti, og sum undir dagsins meining verður nevnt, Landsliðið og fólkaheilsan.

Tað er nevniliga ein sannroynd, at tað als ikki kann lata seg gera at koma so langt framá ítróttarliga uttan at heilsan er í lagi, og tá verður hugsa í víðastu merking, bæði kropsliga og sálarliga.

Fyri at tað skal vera gjørligt hjá landsliðnum at røkka nøktandi málum í dag og í framtíðini, er neyðugt við miðvísum ungdómsvirksemi og greiðum málsetningum, hetta arbeiðið fer fyrst og fremst fram í feløgunum. Afturat arbeiðnum í feløgunum, kemur arbeiði sum Fótbóltssambandið ger í sambandi við ymisku ungdómslandsliðini og til seinast og ikki minst í sambandi við A-landsliðið.

Her er eisini talan um førleikamenning á ítróttarliga økinum og átti til dømis Vinnuhúsið/Oljutingið eisini at havt áhugað fyri hesum – í dag telist ítróttin í Føroyum sum stórsta ítriv, men tað slepst ikki undan at viðurkenna at ítróttin í dag er ein av stóru vinnunum.

Tað er eingin ivi um, at okkara landslið kann verða ambassadørur og fyrimynd fyri føroysku fólkaheilsuni, spurningurin er hvussu gongd fæst á, vónandi kann uppskotstillarin kallar landsstýrismenninar í Trivnaðarmálum, Heilsumálum, og Mentamálum á fund saman við til dømis Vinnuhúsinum og Fótbóltssambandinum fyri at fáa útgreina, um tað ber til og á hvønn hátt hetta kann gerast.

Tað er av stórum týdningi, at ein breið undirtøka er fyri hugskotinum, soleiðis at fólk frá byrjan av fáa tokka til verkætlanina.

# Ikki ein lóg um arv!



**Jógvan á Lakjuni,**
**tingmaður**

Eftir at hava hoyrt samrøðuna, sum útvarpið fríggjakvøldið hevði við Hans J. Joensen, bisp, um lóg um skrásett parlag, haldi eg tað vera neyðugt at koma við eini lítlari viðmerking.

Lógin um skrásett parlag er ikki ein lóg um arv! Hetta kann ein og hvør síggja við at hyggja í ta donsku lógina um "registreret partnerskab". Tað er jú hesa lógina, ið Høgni Hoydal vil hava setta í gildi í Føroyum eisini.

§ 1, sum lýsir endamálið við lógini, sigur: "To personer af samme køn kan lade deres partnerskab registrere". Hetta fortelur okkum, at lógin er ætlað samkyndum, sum vilja liva saman í skrásettum parlagi - t.e. á líka føti við hjún.

Í § 3 í lógini stendur, at skráseting av parlagi gevur sama rættarvirknað, sum hjúnalagið gevur, tó við nøkrum fáum undantøkum. M.a. sleppa samkynd ikki at adoptera, (sum tey sleppa í Svøríki).

Latið okkum kalla ein spaka fyri ein spaka! Lógin um skrásett parlag er als ikki ein lóg um arv, men hevur eittans endamál, og tað er: at javnseta samkynt parlag við hjúnabandið millum mann og konu!

# Betri vitandi fakbólkar

**Hans Birgir Hansen**

Eg eri ógvuliga hart ímóti øllum etableraðum fyritøkum, stovnum, verkum, virkjum, kreftum, skipanum, myndugleikum, vøldir, hvat ið ein ger blaðlesarum nógv greitt.

Tað sama geldur barnagarðum, frískúlar, kommunalar skúlar, hægri skúlar, lærustovnar, lærupláss, hvørs øll geva mær andstygdina innanfyri áðurnevnda í dag.

Eg síggi ikki nakað positivt í tí betri vitandi fakbólkinum, ið leggja niður í børn, ungdómar, tilkomin, ein finst harðliga at í lesarabrøvum, í bløðunum nú í næstum.

Tað er fjøtranin, heildadálkanin, vaskanin, indoktrineran, av sinnalagi, og umskapan til robottmenniskju, ið vera sett í bás, eftir stættarskipan, muni í Føroyum.

Tað er óhugnaligt at uppliva hvussu køld, kynisk, fyrilita, kensla samvitskuleys robottmenniskju eru, ið ein dagliga verður konfronteraður við her í Havnini.

Tað er gott at síggja heimsins undirgang, ragnarrok, sinnissjúku, breiða seg í øllum heimsins londum og tá ið alt er skapt av mannaáðum ein vísir til í dag.

Tað er gott, at menniskjan ikki skilir álvara við nógvu náttúruvanlukkum, ið eru tekin um heimsins undirgang, raknarrok, sinnissjúku, ið skal oyða mannaættina.

Tað er ikki tilvildin ið ræður, hvat ein dagliga alt lívið hevur verið merktur av og tá ein er blivin herdur av øllum skipa persóns- og telefonterror í Havnini.

Tað koma øll at vera kostnaðin av við at falla í egnar gravir, ið grivnar hava verið einum seinastu mongu árini fyri at tæna einaræðisvaldsharrunum.

Tað er gott at kunna eygleiða, filosofera, granska alt og øll knýtt at heildarskipanum í Føroyum.

Betri vitandi fakbólkar eiga ein stóran leiklut í øllum tí ein finst harðliga at í lesarabrøvunum tað skulu øll gera sær greitt í øllum Føroyum.

**Ps.** Betri vitandi fakbólkar skapa falska propaganda


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ein fíggjarlógarviðgerð

**Signar P. Heinesen**



Fíggjarlógin er ein av høvuðsstuðlunum undir praktiska politikkinum. Fíggjarlógin er tann lógin, sum í smálutum stingur út í kortið, hvat vit vilja.

Til tess at røkka endamálinum við lógini, skal fíggjarlógarteksturin og tey tøl, sum liggja aftanfyri vera væl umhugsað og helst skal eingin villa vera í.

Búskaparstýring er ikki eitt mál í sjálvum sær, men búskaparstýringin ber boð um, hvussu væl vit megna at húsast við tí tilfeingi, sum okkum er litið til og okkara evni til at velta burturúr nýggjum. Viðgerðin av fíggjarlógini gevur tí eina samlaða ábending um, hvussu effektivt landsins stýri er.

**Fíggjarlógarviðgerðin hesuferð**

Úslitið hesuferð ber ikki boð um, at nøkur breið politisk viðgerð av fíggjarlógunum tey seinnu árini er farin fram. Heldur ber hendan framløgan boð um, at politisk talv eru leikt úti millum tingmenn og landsstýrismenn og umsitingina, sum hava fingið fíggjarligar avleiðingar - men uttanum fíggjarlógarviðgerðina.

Sagt við øðrum orðum, so bendir hendan fíggjarlógin á, at uppgávan hjá fíggarmálaráðharranum er at kalla ómøgulig í praksis. Hann gerst ein Ramboofigurur, sum einsamallur skal føra kríggj móti einum heilum heri av politikarum og embætisfólki við øðrum áhugamálum. Í hesum døgum uppliva vit, at fjølmiðlar ókritiskt útloysa vápn, sum verða sett fram, til tess at karaktermyrða fíggjarmálaráðharran og annars at gera fíggjarlógarviðgerðina væl truplari enn neyðugt.

Soleiðis, sum eg havi fingið fatan av tí, er tó einki, sum bendir á, at ov lítil peningur er til taks. Tað man vera mikið gott, at vit fingu skarvað hasar 366 mió. kr. av blokkstuðlinum, tí annars var helst størri parturin av teimum pengunum eisini settur í umfarð - hetta neyvan til gagns fyri land og fólk uppá sikt.

At viðgerðin av fíggjarlógini hesuferð er ørkymlandi hoyra vit, tá ið bæði andstøðupolitikarar og samgongupolitikarar gremja seg um, at teir vita ikki rættiliga, hvat verður av teimum pengunum, sum fara til hækkaðar játtanir í ymsum verkum.

**"Livet i løgn" fyri opnum skýggja**

Tann stóri vandin í sambandi við fíggjarlógina er, um "livet i løgn" gerst ein partur av fíggjarlógarviðgerðini.

Fyri nøkrum døgum síðani sóu vit tveir landsstýrismenn, sum søgdu hvør sína søgu um vantandi játtan til postverkið. Sum veljari kann eg staðfesta, at minst annar av hesum landsstýrismonnum segði beinleiðis ósatt. Sum veljari eri eg tí noyddur at gita sum frægast.

Hóast eg ikki ivist í viljanum til gott verk, so veit eg um annan landsstýrismannin, at hansara nærmasti ráðgevi alment hevur sagt ósatt tvær ferðir, tað eg veit um - og landsstýrismaðurin hevur góðtikið tað báðar ferðir. Fyrru ferð sum løgtingsmaður við floksfelaga í landsstýrinum og aðru ferð sum landsstýrismaður. Um hin haldi eg meg vita, at honum ikki nýtist ósannindi ella ósanna atferð, og at hann roynir at útinna politikk eftir bestu sannføring. Annað, sum er komið alment fram, gevur mær somu fatan.

**Persónar ella "system"**

Eru tað persónarnir, sum ikki eru búnir til uppgávuna, ella er tað skipanin sjálv, sum er skeivt samansett - tað, vit ofta nevna "systemfeilur". Hetta er ein høvuðsspurningur fyri okkum veljarar, sum hava evstu ábyrgd av teimum politisku avgerðum, sum framdar verða, tá ið vit síggja ella hóma ein trupulleika.

Heilivágurin fyri skeiva persónsamanseting er, at vit veljarar velja onnur fólk ella aðrar flokkar. Stutt og greitt.

Heilivágurin fyri ein "systemfeil" er væl truplari at finna og ikki minni trupul at fáa at virka í praksis. Systemfeilir kann veljarin ikki einsamallur gera stórvegis við - felags tøk millum veljara og veljarans umboð er einasta leiðin.

Onkrar ábendingar um, at persónar ikki eru búnir til uppgávuna, síggja vit bæði í sambandi við landsstýrismenn og í sambandi við embætisfólk. Viðgerðin í sambandi við siðsemisnevndina, yvirtøkuna av kirkjuni, spurningin um samkynd og stórur partur av viðgerðini av samferðsluni eru dømi, sum vísa, at fólk á ovastu rókunum ikki eru búgvin at savna og leiða fram móti felags málum við felags tilfeingi.

Hóast hesar ábendingar um persónar, so eri eg ikki so vísur í, at tað er høvuðstrupulleikin. Eitt samfelag má tola, at øll ikki eru eins sterk og at øll ikki eru eins búgvin. Eisini á teim ovastu rókunum.

**"Systemfeilir"**

Ein "systemfeilur" í almennu skipanini hevur nøkur eyðkenni, m.o.:

- Vit missa tamarhaldið og einki sett av ítøkiligum persónum í ítøkiligum embætum kunnu rættiliga taka kvørkratak um skeivleikar
- Skeivleikar hava lyndi til at "rósa" - gerast verri og verri. Heldur enn at læra av skeivleikum verður onnur royndin verri enn tann fyrra.
- Tað verður truplari og truplari hjá fleiri og fleiri fólkum í almennari tænastu at røkja sítt starv við nærlagni og samstundis vera eitt hampafólk.
- Fólk, sum vit annars rokna sum skilafólk, gera tápuligar gerðir
- Áhugamál eru í fløkju

Ein "systemfeilur" kann hava sín kjarna í eini politiskari skipan. Avtikni "ráðfiskagrunnurin" man vera tann kendasti her á klettunum. Í hesum føri skuldi tað so verið partar av stýrisskipanini ella tingskipanini, sum eru óhepnir.

Ein "systemfeilur" kann eisini hava sín kjarna í almenna bygnaðinum. Vit vóru fleiri, sum vístu á hendan vandan í sambandi við tann bygnaðin, sum varð stungin út í kortið í 1995-96 og sum vit hava í dag. Hóast tað mesta gekk væl verri, enn eg hevði hugsað tað møguligt, so eri eg ikki vísur í, at bygnaðurin í sjálvum sær er kjarnin í tí ørkymlaða politiska talvinum í dag. Men tað kann vera partur av málinum.

Ein "systemfeilur" kann hava sín kjarna í systematiskt skeivt útvaldum fólki á ovastu rókum. Taka vit dømi úr fótbóltinum, so mega vit rokna við, at landsliðið fær vána úrslit, um vit taka allar spælararnar úr ringastu liðunum í landskappingini. Atferðarlæran hevur eitt hugtak um leiðara við at kalla ongum uppbyggjandi eginleikum, sum hon nevnir ein "Nullert". Situr ein slíkur ovast í eini skipan, so er "...ingen livsgnist, ingen kamplyst, ingen målbevidste meningsfyldte aktiviteter. Der er ingen kreativitet eller integration af mennesker tilbage - kun goldhed.", Ichak Adizes, Lederens faldgruber, 1979(1999).

Ein "systemfeilur" kann eisini hava sín kjarna í teim ráðandi virðum, sum liggja til grund undir atferðini hjá persónum í teim ovastu løgunum í politisku flokkunum og í embætisverkinum. Í hesum sambandi er helst vert at nevna gomlu griksku leiðsluidealini, har leiðarin ikki søkti starv, men varð útvaldur. Tað hevði helst nakað at gera við ta sannroynd, at har viljin til makt ræður er eisini vilji til at sita ovast, men sjáldan við leiðsluidealum í huga.

Vit kunnu vera óheppin og fáa feilir, sum eru samansetingar av fleiri møguleikum. Vit hava t.d. eina stýrisskipanarlóg, sum gevur landsstýrismanninum víðar heimildir. Um vit samstundis hava persónar í ovastu løgunum, sum ikki taka tað so tungt við ósannari atferð og ósannindum, tá hava vit onga stýrisskipan og einki rættarsamfelag. Leiðslutekniskt fáa vit tá ein leik, har tann veikasti systematiskt verður eftir, heilt einfalt tí tey, sum eru at sær komin, taka seg burturúr slíkum fjákalótum.

**Eru grundleggjandi trupulleikar í okkara politisku skipan?**

Fíggjarlógarviðgerðin hesuferð er løgin. Samgongustevið er ikki gott og andstøðan brúkar hetta til at vísa á, at betur var við eini aðrari samgongu. Hetta er natúrligt í politikki.

Fyrrverandi og núverandi løgtingsformenn hava nakrar viðmerkingar, sum benda á, at teir meta, at broytingar í mannagongdum skulu til, fyri at fáa fíggjarlógarviðgerðina á beint. Finnbogi Ísakson nevnir eisini hetta, at partur av fíggjarlógini liggur uttanfyri sjálva lógina, t.d. 60 mió. grunnurin og onkrar av teim stóru almennu íløgunum.

Magni Laksafoss hevur eisini gjørt nakrar áhugaverdar viðmerkingar, m.a. um konjunkturstýringar. Hetta er alt samalt helst mikið viðkomandi og eru góð íkast til eina breiða politiska fíggjarlógarviðgerð, men eg kenni meg lítið sannførdan um, at hesar viðmerkingar raka kjarnan í málinum í sambandi við hesa fíggjarlógina. Uttan at hugsa í persónum, so haldi eg tað vera vert at spyrja, um støðan var stórt øðrvísi, um hesi sótu við valdinum, hóast viljin til at gera tað betri er til staðar. Snøgt sagt, tí eg ivist ikki í, at viljin hjá samgonguni er góður. Um ein er politiskt samdur ella ikki, er so annar spurningur.

Vit gera helst gott í at spyrja okkum sjálv, um hendan løgna fíggjarlógarviðgerðin er úrslit av smávegis persónligum veikleikum, veikleikum í persónsamansetingini, vána mannagongdum ella "ein ringur dagur" - ella um hendan gongdin er eitt úrslit av meira grundleggjandi trupulleikum í okkara politisku skipan.

# Orðabókin

**Heri Mohr**



Tá ið Føroysk Orðabók kom út í 1998, fegnaðust bæði leik og lærd. Eitt megnarverk í okkara bókmentum: 1596 síður, umleið 30000 orð við frágreiðingum - sum óivað finst á mangari reol í Føroyum, (hóast tað orðið stendur ikki í bókini). Hann, ið hetta skrivar, brúkar orðabókina dag og dagliga.

Men tað er ein mangul, at nógv orð, sum verða brúkt í dagligari talu, ikki eru at finna í bókini, eitt nú navnorðið mangul. Konvoluttur, sum hevur verið til keyps í bókahandlunum í Havn frá fyrsta degi av, er ikki at finna í bókini, men í hansara stað finna vit orðið brævbjálvi, sum merkir »umslag um bræv ella samanløgd køka«. Her í Havn (og óivað aðrastaðni við) hava vit altíð lagt ella koyrt bræv og kort í konvolutt, áðrenn tað verður tveitt í postkassa. Tað kann koma fyri, at pappírsumslag og tape verður brúkt, um konvoluttur ikki er í húsinum, og tað riggar væl, men tá tosa vit ikki um konvolutt.

Hvussu ber tað til, at belgiari eitur belgi og kanadiari eitur kanadiamaður í orðabókini? Flest allir føroyingar siga, at í Belgia búgva belgiarar, og í Kanada búgva kanadiarar o.s.fr.

Og hvussu ber tað til, at næstan øll lond í Europa eru nevnd í bókini, men so at siga onki av londunum í Asia, Afrika og Norður- og Suðuramerika eru nevnd. Ermarsund og Oyrasund eru, men ikki Svartahavið o.s.fr.

Og hvat skulu vit halda um tað, at nautisk tól ella amboð, sum eru ómissandi hjá bátum, skipum og flogførum, eru ikki í orðabókini! Kann sjómansskúlin undirvísa við ongum nautiskum amboðum? Og hvat siga tannlæknar til tað, at forlornar tenn ikki sampakka við føroyska tungu? Handilstenn! Jamen, hvussu so við teimum ymisku gjørdu limunum: hendur, armar, bein. Tosa vit tá um handilsbein ella handilseyga? Og ikki um protesur?

Verri er tó statt við okkara latínska alfabeti, sum máttmiklir menn ósmæðið og eirindaleyst hava svævað. Í skrift og talu eru vit strongd; gjørd ógreið, fløkt, stereotyp. - Tað sakar kanska einki, at c,q, w, x, z eru tveitt á bláman, bara vit rótføroyskt kvøða um felags lagnu og felags blóð.

Sum rosinan í pylsuendanum so mugu vit staðfesta, at orðið alfabet finst als ikki í orðabókini!Og heldur ikki orðið makkverk.

Fjølmiðlarnir og onnur,

*Framhald á síðu 14*